DAGSINS MEINING

Týdningarmikil gransking

Í tíðindaskrivi í gjár varð upplýst, at nevnd fyri vælferðargranskingarætlan undir Norðurlandaráðnum skipar fyri ráðstevnu í Føroyum um gransking innan sosial-, heilsu- og arbeiðsmarknaðarviðurskifti í útnorðri. Í tí sambandi verður almennur pallborðsfundur í Klingruni í Norðurlandahúsinum fríggjadagin 3. september kl. 13. Við pallborðið verða norðurlendskir og føroyskir granskarar, umboð fyri vælferðargranskingarætlanina undir Norðurlandaráðnum og føroyskir politikarar. Ráðstevnan er partur av einari fimm ára vælferðargranskingarætlan, sum Norðurlandaráðið setti í verk í ár 2000. Á ráðstevnuni, sum er fyri innbodnum, luttaka granskarar, sum granska í sosial-, heilsu- og arbeiðsmarknaðarviðurskiftum og onnur við serligum tilknýti til hetta øki.

Endamálið við ráðstevnuni í Føroyum er at eggja til gransking í sosialum og heilsuligum viðurskiftum í útnorði við tí fyri eyga at skapa vitan um, hvussu samfeløgini eru skipað, at gera samanberingar møguligar og harvið skapa eitt haldgott støði í orðaskiftinum um vælferðarskipanir og vælferðarpolitikk.

Tað er alkunnugt, at hugsjónin um norðurlendska vælferðarsamfelagið hevur fört til, at Norðurlond eru millum tey lond í heiminum, har fólk hava tað best, um samanborið verður við onnur lond kring heimin. Hetta merkir als ikki, at øll hava tað gott, og at tað ikki er neyðugt við støðugum ábótum og dagføringum. Tað er eisini greitt fyri teimum flestu, at norðurlendski vælferðarmyndilin er undir trýsti frá høgravendum politiskum flokkum. Hartil kemur, at sosialdemokratisku flokkarnir eru farnir at endurskoða sína støðu til vælkenda norðurlendska vælferðarmyndilin. Vælferðarsamfelagið er snøgt sagt vorið ov dýrt, samstundis sum tey, sum skulu gjalda fyri vælferðina gerast alt færri og færri. Her er sostatt eitt øki, har stórur tørvur er á vitan, og hesa vitan fáa vit bert frá gransking. Vælferðargransking er tí eitt sera týdningarmikið og viðkomandi granskingarevni.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Ruskpláss á Glyvursnesi

Jógvan Arge
býráðslimur

Tórshavnar Kommuna hevur brúkt tíggjutals millionir til spronging og útgrevstur á Glyvursnesi.

Grót í túsundtonsatali er flutt haðani til havnarbygging í Havn seinastu 20 árini. Burtur úr er komið eitt alstórt slættað lendi, sum svarar til fleiri traðir í stødd.

Víst er eitt ávíst beni í lendinum, men inni í brotinum eru nógvir møguleikar, sum byggjast kann á.

Skala bara nevna, at vit hava havt ilt við at finna eitt stað, har tú kanst hava ítróttavøll til frælsan ítrótt. Vit hava í áravís leitað eftir lendi til eina koyribreyt ella hálkubreyt uttan at koma mál.

Tílíkt átti at verið umhugsað á Glyvursnesi saman við øðrum meiri spennandi møguleikum, tí bara hugflogið setir mørk.

Á Vaglinum røkkur hugflogið ikki longur enn til at brúka hetta dýrkeypta stað til ruskpláss.

Tekniska fyrisitingin hevur áhaldandi — óivað eftir ordrum - mælt heilsu- og umhvørvisnevndini til at gera nýtt tyrvingarpláss á Glyvursnesi og fylla hendan Føroya størsta og dýrasta útgrevstur upp aftur við tí, sum ikki kann má brennast á Hjalla.

Heilsu- og umhvørvisnevndin helt eitt sindur ímóti og bað í fyrsta umfari um alternativ uppskot. Men úrslitið var tað sama. Mælt varð til at gera tyrvingarpláss í grótbrotinum á Glyvursnesi, og meirilutin í nevndini tók undir.

Kvinnurnar í nevndini eru kortini ikki so sannførdar sum menninir. Beata L. Samuelsen mælir frá ætlanini og tað sama ger Hildur Eyðunsdóttir við einum kravi um, at málið kemur fyri býráðið.

Tað er ikki neyðugt at dylja, at tær eru ikki einsamallar um at ivast í ætlanunum.

Kirkjubøar Kommuna leggur saman við Tórshavnar Kommunu 1. januar. Fáur mundi rokna við, at fyrsta stigið í hesum samarbeiði skuldi verða stovnan av ruskpláss í tí hugnaliga haganum hjá kirkjubømonnum, sum argjafólk og havnarfólk alt meir eru farin at brúka sum rekreativt øki.

Málið kemur til viðgerðar á býráðsfundi hósdagin. Líkt er til, at hann endar við eini princippsamtykt um at leggja grótbrotið á Glyvursnesi av til ruskpláss.

Tað er bæði synd og skomm fyri nýtsluna av Glyvursnesi í framtíðini og ikki minst fyri tey, sum skula tola alla burturkoyrsluna út á Glyvursnes so at siga ígjøgnum túnið hjá sær í áratíggjur fram í tíðina.

Sjónvarpsins sjakalar stigmatisera smádrong

Virgar T. Dalsgaard

Sjónvarp okkara er ikki longur bara ein farca - tað er landsins størsta skomm! Tað er eftirhondini valla nakað mál, sum fyri sjónvarparar er ov privat ella ov smátt til at brúka í síni undirlutakenslu fyri dønum og síni perverteraðu dæmonisering av Danmark. Alvarsom samfelagsmál, sosum landsskaðiligt virksemi og maktmisbrúk hjá fleiri tjóðveldispolitikarum, ignorera varpingarmenn fulkomuliga, men kommunal mikromál sum næstan bara hoyra tí absoluttu privatsfæruni til, og sum tað hevði klætt elektróniskum tíðindastovnum at lopið heilt um - ja, tey verða forfylgd, toygd og skeiklað til ónossliga og ókenniliga keipumynd av veruleikanum!

Í skjótt eitt hálvt ár hava Sjónvarp Føroya og serliga harra Grækaris Magnussen válkað sær í vanlagnuni hjá einum ólukkuligum føroyskum smádrongi av danskari ætt. Einasti veruligi taparin í málinum er drongurin, sum ætlandi er stigmatiseraður í føroyska samfelagnum fyri lívstíð!

Men sensatiónssvongdin hjá einum eirindaleysum mikrofonterroristi gongur framum alt annað, og so má sakligi og juridiski sannleikin dvína.

Tað gevur at bíta, nú ikki bara danir, men eisini socialu myndugleikarnir í Havn hálvavegna verða lagdir undir at vilja nápa smábørn frá væl defineraðum føroyingum, tí at samvitskufull embætisfólk í Havn hava kent sína vitjunnartíð, fylgja lógini og respektera foreldrarættindini hjá einum donskum einkjumanni! Tað skal tó sigast, at allarflestu hyggjarar langt síðani hildu sjónvarparar vera farnar út um alt sømuligt mark!

Meginhyklarin Grækaris Magnussen

Men kortini eydnaðist tað mikrofonjassinum Grækarissi Magnussen at seta nýtt met í hysteriskum følilsisporno í síðstu viku við at elta drongin heilt vestur á flogvøllin, so øll tjóðin kundi gráta synkront um, at

Framhald á síðu 11

Innsent tilfar
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bleðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Fyrsta skipið lagt at við djúphavnina í Vági

Simone J. legði at í djúphavnini sunnukvøldið. Tá ið havnin er heilt liðugt verða í hvussu so er fortreytirnar fyri vinnulívi í lagi

DJÚPHAVN
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Simone J. var fyrsta skipið, sum legði at í nýggju djúphavnini í Vági

Nú nærkast dagurin, tá ið djúphavnin í Vági verður heilt liðug.

Kortini er hon nú so mikið liðug, at tað ber til hjá skipum at leggja at, tí sjálv atløgubryggjan er liðug.

Og tað varð farmaskipið, Simone J. sum fekk heiðurin at vera fyrsta skipið, sum legði at við djúphavnina.

Simona J. kom á Vág sunnukvøldið eftir ymsum broytum og ymsum amboðum og hon lá í nakrar tímar. Annars er eftir at asfaltera havnalagið og at gera ymiskt annað.

Men Jógvan Krosslá, borgarstjóri, sigur, at eftir avtaluni skal havnin vera heilt liðug um mánaðarskiftið september - oktober og tað verður hon.

Nýggja djúphavnin í Vági kostar 18 milliónir.

Við nýggju djúphavnini, hevur Vágur fingið rættiliga nógv av rættiligadjúpum atløguplássi.

Har, sum farmaskipið liggur, eru 86 metrar av atløguplási, har dýpið er 10 metrar. Framvið á á vestursíðuni eru einar nakrir og 70 metrar av atløguplássi afturat, har dýpið er ímillum 8 - 10 metrar.

Hinvegin er støðan í Vági onki serlig í løtuni. Men borgarstjórin ivast ikki í at tíðirnar fara at skifta.

Síðani farið varð undir djúphavnina, havafleiri virki lagt stilt, ella er virksemið munandi minkað.

Og nú djúphavnin er liðug, eru í hvussu so er karmarnir fyri fjølbroyttum vinnulívi til staðar.

Framhald av síðu 10

ein smádrongur noyddist niður til biologiska pápa sín í Danmark (sic). Hyggjararnir sluppu eisini at síggja stórhyklarin Grækaris fella krokodillutár, meðan barnið fór inn í flogfarið, og síðani lýsti miðlasjakalurin við salvilsisfullari piprandi rødd støðuna, sum um har avgjørt var talan um eina hálvkriminella deportatión ella ævigt fortapilsi, - altso tað einfalda sakliga faktum, at drongurin skuldi sleppa niður til pápa sín! Henda antihending verður lýst sum ein døpur og syndarlig griksk tragedia. - Er einki lágmark fyri, hvat ein sonevndur journalistur kann troysta sær? Hvar er sansurin fyri proportiónum hjá hesum ódelikata miðlamanni?

Tí hvat er nú reelli substansurin í hesum tragiska máli? Jú, í stuttum tað, at mamma drongin, sum var føroysk, doyði í vetur, og pápin, sum hevur foreldrarættin, býr í Danmark. Socialu myndugleikarnir í Havn hava tí hildið rættast at senda drongin til Danmarkar, har teir eisini halda, at drongurin, sum hevur sonevnda DAMP-brekið kann fáa meira stimbrandi hjálp og hollari umhvørvi, enn føroyingar kunnu bjóða honum.

Kvalificeraði donsk tilboð um slíka professionella serhjálp áttu vit at fegnast um, tí Føroyar kunnu snøgt sagt aldri nakrantíð í nær ella náminda fáa ráð til at finansiera alla serhjálp, psykoteknisk tiltøk og umsorgan fyri einumhvørjum breki! Skilagóða og juridiskt rætta avgerð embætismanna er av fjølmiðlum projicerað upp til eina nationala katastrofu, har sjálvt omma drongin á ótrúliga kyniskan hátt hevur verið brúkt sum amboð!

Hví ikki venda málinum við?

Er veruliga eingin av hinum fjølmiðlunum, sum hevur tikið málið upp og lýst tað frá einum meira edrúiligum og seriøsum vinkli? Nei, tíanverri - hvørki bløð ella útvarp hava havt tað neyðuga dirvi til at steðga einoygdu øsingini hjá sjónvarpinum. Tey eru kanska ikki farin heilt niður í sama vamlisliga køstin sum Grækaris Magnussen, men tey hava heldur ikki torað ella roynt at sett málið í perspektiv og víst á, hvussu andstyggiliga hykleriskt, sjónvarpið hevur verið. Tey kundu t.d. heilt einfalt speglvent málinum, so fólk sissaðust aftur! Tað er gamalt og vælroynt snildi í øllum seriøsum og kritiskum journalistikki!

Hvat høvdu føroyingar sagt ella hildið, um málið var beint øvugt? Lat okkum royna at venda málinum 180 gradir! Vit hugsa okkum eina danska mammu, sum doyr frá soni sínum í Danmark. Danski drongurin hevur føroyskan pápa, sum eisini hevur foreldramyndugleikan. Pápin býr í Føroyum. So hugsa vit okkum tann hypotetiska og groteska leik, at danskt sjónvarp var so primitivt, at teir fóru at hetza móti Føroyum, føroyskum máli og tí fiktiva føroyska pápanum. Ja, vit vita øll, at danskt sjónvarp hevði aldri funnið upp á slíkt kensluporno, men um so var, hvat so….? Vit hóma longu hatsku og grátuligu ræðuleikasendingarnar hjá kynikaranum Grækarissi um smakkleysan danskan yvirgang, og vit kunnu illa gera okkum far um, hvussu fúlur kenslu-køsturin hjá sjónvarpsGrækarissi tá hevði havt verið! Men hetta var tíbetri konjunktivur!

Sum ravnur um deyðseyðakrov

Tað er royndur lutur, at latir og talentleysir journalistar ofta liva av at skriva um ófrættir, vanlukkur og feigdartilburðir. Sovorðnir »tíðindamenn« tíggja sær næstan sum slevandi rovdjór um rotnan skrokk.

Slík skriving tekur lítla tíð og krevur sjáldan dirvi ella dugnaskap. Hon verður ofta kallað gulur journalistikkur ella boulevardpressumeiggjan, og er avgjørt ikki nógv umhildin. Teir sensatiónsfegnu journalistar, sum prostituera seg og fonglast við slík tíðindi, verða professionelt vanvirdir av seriøsum lagsfeløgum.

Viðhvørt royna boulevard-journalistarnir seg sum eitt slag av høvundum og geva út sensatiónsbøkur uttan nakað, hvørki fakligt ella litterert virði. Slíkar køstabøkur plaga í útlondum ofta at koma í handlarnar beint fyri jól, so tær verða loftaðar av jólagávumeldrinum, har fólk ikki eru so kritisk við krøvum til innihaldstilfarið. Burtursæð frá teimum vulgeru lættisoppabókunum hjá Arge-feðgunum hava føroyingar stórt sæð verið spardir fyri hetta óhumska slagi av skriving. Tað rós skulu føroyskir blaðmenn eiga!

Men so fingu vit Grækaris Magnussen - charmerandi sjakalin í føroyskum journalistikki! Hesin maður beinleiðis válkaði sær í tragedium! Hann hevði púra einki etiskt afturhald - einki privat mál var ov viðkvæmt, einki var ov intimt og einki var ov erkvisið fyri henda mann at fonglast við. Hann skrivaði t. d. eina stak vánaliga bók um flogvanlukkuna í Mikinesi í 1970, hóast nógv av teimum, sum við vóru, enn eru á lívi og avgjørt ikki dámdu bókina. Bókin er spinkul í innihaldi, hevur ógvisligar, ágangandi myndir og sjáldsama grunna tekst.

Men ikki nóg mikið við tað - Grækaris herjaði eisini á eina familju á Oyri, eina familja, sum var plágað av eini heilt privatari konflikt, eini ósemju, sum avgjørt ikki rakti almenningin. Men egocentrikarin Grækaris tevjaði blóð beinanvegin og skrivaði eina fulkomuliga óneyðuga bók um ta ólukkuligu familjuna, har hann heilt vrakar aldargomlu latínsku reglruna, audiatur semper altera pars um altíð at lurta eftir báðum þørtum. Hann letur ein beiskan mann, sum leingi hevur ligið í álvarsomum familjustríði, spilla annan partin av familjuni út, uttan at hin versiónin verður tikin við. Bókin er eitt makkverk, eitt meistarastykki í undirlødigheit! Tey avvarandi eru bæði skelkaði, sorgarbundin og ill. Tey hava fleiri ferðir umhugsað at lagt sak fyri ærumeiðing móti hesum ónossliga sjónvarpsskribenti.

– So fáa vit at síggja, hvat verður burturúr, sigur hann.

(meira í blaðnum í morgin)